# Reyði Krossur: 50.000 kr. úr Føroyum til Java

**Herviligi jarðskjálvtin á oynni Java í Indonesien hevur higartil kravt eini 5000 mannalív.
– Føroyska deildin av Reyða Krossi sendir nú hjálp til neyðhjálpararbeiðið á oynni, upplýsir formaðurin, Suni Vinther**

NEYÐHJÁLP
*Snorri Brend*

**Indonesien:** Omanfyri 200.000 fólk í Indonesien, harav fleiri teirra eru børn, standa í løtuni heimleys og við eini ótryggari framtíð.

Jarðskjálvtin um vikuskiftið tók við sær tað tey áttu, bæði familju og heim, – snøgt sagt alt. Eftir standa hesi fólkini einsamøll, svong og illa fyri.

Mong menniskju liggja eisini særd úti, og inni á sjúkrahúsunum gera starvsfólkini alt fyri at veita fólki ta mest neyðturviligu hjálpina.

Tey vita, at pláss er ikki fyri øllum sjúklingum inni á sjúkrahúsunum á oynni.

– Líka so skjótt tey koma inn, fáa tey viðgerð og verða síðani løgd útum aftur. Tað er sjálvandi ikki forsvarligt, sigur Peder Damm, sum er leiðari fyri hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í Indonesien.

Í arbeiði sínum eru Peder Damm og hansara fólk eisini komin til landsbýir, har alt er javnað við jørðina. Fólkini sita snøgt sagt uttan fyri og hava savnað saman allar ognir sínar.

– Støðan hjá teimum heimleysu gerst ikki betri av at tað regnar í økinum, sigur danski umboðsmaðurin.

Hesi tíðindini eru eisini komin til Reyða Kross í Føroyum. Og á fundi í gjár varð avgjørt, at lata 50.000 kr. til neyðhjálpararbeiðið á oynni Java.



*Neyðin er stór á Java, og fólk í neyðhjálparørindum gera eitt stórt arbeiði. Her eru tey við eitt av teimum raktu fólkunum*
*Mynd: Reuters*

### Tjald og peningur

Tað er tí ikki bert føroyska deildin av Reyða Krossi sum er virkin í hjálpararbeiðinum eftir jarðskjálvtan – og annars fylgir við gongdini, nú vandi somuleiðis er fyri at eitt eldgos fer at goysa.

Danski Reyði Krossur hevði í hesum sambandi sett 300.000 kr. av um okkurt álvarsligt skuldi hent í samband við eldgosið. Nú hevur ein so ístaðin avgjørt at brúka hesar pengarnar til hjálpararbeiðið eftir jarðskjálvtan.

Norski Reyði Krossur hevur havt eitt feltsjúkrahus liggjandi í høvuðsstaðnum síðan tsunami-flóðalduna.

Henda útgerð verður nú útpakkað og latin indonesisku deildini av Reyða Krossi. Umframt hetta ætla norðmenn at senda seks fólk yvir at hjálpa til við arbeiðinum í feltssjúkrahúsinum.

Hóast Reyði Krossur í Føroyum hevur latið hesar 50.000 kr. til Indonesien, so ber framvegis til hjá fólki at stuðla arbeiðinum.

Hetta kann gerast við stuðli umvegis onkran av peningastovnunum, ella við at ringja 905656, tá leggur Føroya Tele 100 krónur omaná tygara telefonrokning og flytur peningin til Reyða Kross Føroya.

# Rebecca: – Spennandi at vitja Føroyar

**Mikukvøldið verður ein forvitnislig konsert í Kelduni í Skálafirði, tá Rebecca St. James vitjar her á fyrsta sinni. Og tað er nakað hon sær fram til.**

KONSERT
*Snorri Brend*

**Keldan, Skálafjørður:** Í kvøld hevur kenda songkvinnan konsert í ungarska høvuðsstaðnum Budapest.

Síðani verður leiðin løgd móti samkomubygninginum hjá Kelduni í Skálafirði, her konsert verður mikukvøldið kl. 20.

Henda konsertin er partur av eini Europa-turne, har hon altso hevur lagt leiðina til Føroyar eisini.

Fyri hana verður hetta ein serstøk uppliving, tí tað er ikki á hvørjum degi at hon leggur leiðina til slík fjarlagin støð sum okkara. Henni dámar hinvegin væl at hava konsertir á støðum, har stórar konsertir vanliga ikki verða fyriskipaðar.

*Rebecca St. James ferðast í hesum døgum kring Europa á konsertferð. Mikukvøldið fer hon á pall í Skálafirði*



Mongu útlendsku viðhaldsfólk hennara vita helst ikki hvar Føroyar liggja. Tí hevur hon gjørt ein link á heimasíðu sínari til eina føroyska heimasíðu, har fólk kann fáa alt at vita um vakra land okkara.

Henda vakurleikan fer Rebecca helst eisini at uppliva, tá hon kemur higar í morgin.

Í kvøld verður møguleiki at lurta eftir eini samrøðu við Rebeccu á Rás2. Kl. 22 fer Heini Lützen nevniliga at skifta orð við hana í andaligu tónleikasending síni við heitinum"Halleluja".

STUTT SAGT

## 24 mió til ellisheim

**Havn:** Tórshavnar kommuna hevur fingið 12 mió kr í stuðli til bygging av einum ellisheimi uppí Tjarnagarð.

Hetta heim er undir bygging, og skal hava 24 búpláss. Kostnaðurin er mettur til 29 mió kr.

Samstundis er greitt, at kommunan eisini fær 12 mió krónur til 24 pláss á einum ellis- og røktarheimi, sum skal byggjast undir Boðaneshamri. Nú verður farið undir fyrireikingarnar til hetta heim, sum hevur bíðað eftir játtan frá landinum.

– Við hesum báðum játtanum fær Tórshavnar kommuna 48 búpláss aftrat á ellis- og røktarheimum, upplýsir Jógvan Arge, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini.

Men sum hann tekur til: – Hetta hjálpir væl, men nøktar neyvan allan tørvin!

**sb.**

## Nýtt reinsiverk í komandi mánaði

**Sørvágur:** Umsíðir er líkt til at íbúgvararnir í Sørvági kunnu verða vísir í, at vatnið teir drekka er fullkomuliga reint.

Í farnu viku fóru menn nevniliga undir at seta upp tað nýggja reinsiverkið, sum skal tryggja bygdarfólkinum reint vatn.

Arbeiðið, sum menn frá Nomatek og Hanna Olsen gera, fer at taka einar tvær vikur aftrat.

**sb.**



*Sørvingar fáa nú reint drekkivatn*

## Betri tænastu til tele-kundarnar

**Skopun:** Í farnu lat upp nýggj handilshøll, nevnd Lonin í Skopun. Umframt matvøruhandil og salong er eisini ein telebúð í høllini.

Tað er Føroya Tele, sum við hesum stiginum ynskir at koma nærri kundunum. Soleiðis kunnu teir vísa fram eitt breitt úrval av øllum tí, sum hevur við telefonir at gera og samstundis veita nýggjum og gomlum kundum eina betri tænastu.

Her verður m.a. hugsað um tey rørslutarnaðu og fólk við barnavognum, sum her hava góðar møguleikar fyri at vitja høllina.

Nevnast kann eisini, at nýggja telebúðin hevur víðkað munandi um upplatingartíðirnar. Nú kunnu fólk fara til handils hvønn dag millum kl. 10 og 17.

**sb.**



*Skopuningar hava nú fingið eina nýggja handilshøll og eina nýggja telebúð á sama staði*